## Vitjan úr Havn

**Vágur:** Fyrru helvtina av høgtíðini fær samkoman hjá Frelsunarherinum vitjan bæði úr Noregi og úr Havn.

Talan er um Kristian Nygård, sum er lærari á fólkaháskúlanum hjá Frelsunarherinum í Noregi og tónleikarum úr hornorkestrinum hjá samkomuni í Havn.

Møtir verða bæði skírisdag og langafríggjadag inni. Viðrar, er ætlanin somuleiðis at hava møtir uttandura.

## "Alt av náði" í Meinigheitshúsinum

Havn: Frá skírisdegi og alla páskahalguna verða páskamøtir við yvirskriftini "Alt av náði".

Á møtunum verða lokalir talarar og sangkreftir ymsastaðni frá. Leygarkvøldið er serstakt ungdómstiltak á skránni.

# Trúboðarastevnan byrjar við framsýning og sangi

**Ein spennandi trúboðarastevna við framsýningarbásum verður í Runavík á páskum.**
**Á framsýningini verður alt frá barnalegum heima og burturi, til hjálp og trúboðan á torførum støðum.**

PÁSKASTEVNA
*Snorri Brend*

**Runavík:** Stevnan verður sett í ítróttarhøllini skírisdag klokkan 17:30.

Sjálv framsýningin letur upp henda dagin klokkan 16 og síðani setir Símun í Túni stevnuna, har sangbólkurin SALT fer at syngja nakrar sangir.

Símun í Túni er toftamaður og hevur í 25 ár verið trúboðari í einum ættarbólki, sum kallast Yanomami inni í frumskóginum í Venezuela.

Símun og familjan komu heimaftur fyri 6 árum síðani, men tey arbeiða enn við at umseta skriftirnar til Yanomami málið.

Herfyri var Símun ein túr yviri í Venezuela í hesum sambandi.

Sangbólkurin SALT er ikki heilt ókendur. Tey hava glett mong við sínum framúr væl framførda sangi.

Stutt síðani vóru tey í Íslandi, har tey høvdu fleiri høvi at syngja, og vóru tey sera væl móttikin. Tey fara uttan iva at seta ein serligan dám á setanina av stevnuni.

- Vit vænta at mong koma til stevnuna, sigur ein av fyrireikarunum, Jens Olsen.

Stevnan heldur annars fram allar páskadagarnar í ítróttarhøllini og einum tjaldi, sum er sett upp nærhendis í sambandi við stevnuna.

Høvuðstalari er Paul McIlwain frá felagsskapinum New Tribes Mission.



*Símun í Túni setur trúboðarastevnuna í Runavík. Hann og familja hansara hava verið trúboðarar í Venezuela í mong ár*

# Sigurin páskamorgun

**"Tá ið nú Jesus hevði fingið edikin, segði hann: "Tað er fullgjørt!". Og hann boygdi høvdið og gav upp andan (Jóhs. 19,30)**

*Eftir Kjartan Stakksund, Eiði*



*Kjartan Stakksund*

Tað sum hendi í grøvini páskamorgun var eitt satt undur. Jesus var deyður, var lagdur í grøvina aftaná krossfestingina, men reis aftur úr grøvini páskamorgun.

Hetta var nakað heilt óvanligt sum hendi hendan morgunin; ein stórur steinur var lagdur við gravarmunnan, afturat tí var tað rómverska innsiglið sett á steinin og dyggilig vakt var sett við grøvina við rómverskum soldátum, fyri at ikki nakað skuldi henda grøvini.

Teir mundu ikki kenna seg heilt tryggar, tí at Jesus hevði sagt so nógv meðan hann livdi, sum ljóðaði marghháttligt í oyrunum á teimum sum hoyrdu hann tala, so best var at vera fyrivarin, og gera alt so trygt sum møguligt, men teir vóru heilt gjørdir til skammar.

Gud hevði eina heilt aðra ætlan, eina frelsuætlan fyri ta falnu mannaættina, sum á sinni var rikin út úr aldingarðinum vegna stóra syndafallið, sum umfataði allan mannaheimin og eisini okkum sum liva í dag. Tí er tað alneyðugt at vit taka ímóti hesum gleðiligu tíðindum, at Jesus var uppstaðin, og takka honum fyri hetta undurfulla frelsuverkið á Golgata.

Hvussu er tín støða yvirfyri hesari greinini? Tú veitst við tær sjálvum, um tú ert á lívsins vegi ella tú gongur á glatunar vegi soleiðis sum Sálmur 139 sigur í ørindi 24: "Vita, um eg gangi á glatunarvegi og leið meg hin æviga vegin!" Hetta er tann brennandi spurningurin tá tað snýr seg um ævinleikan. Hvørja leið gongur tú? Við hesum orðum vil eg ynskja øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni, og vil eg enda við einum páskasálmi eg havi yrkt til páskirnar 2007.

## Páskasálmur 2007

Lag: Bf. 83. Koralbogen 164,165

*Sigursæla páskagleði*
*gevur vón og trúarmót;*
*sigursæla Andans megi,*
*Jesus týndi syndarót.*

*Deyðin nú er yvirvunnin,*
*Jesus stóran sigur vann;*
*náttin burtur nú er svunnin,*
*Gudi eg tí prísa kann.*

*Undurfulla páskagleði,*
*vónar trygga akkersgrund;*
*gevur sálum vónarmegi,*
*um eitt lív á himnagrund.*

*Nú eg kann við vón her hvíla,*
*við tað stóra frelsuverk;*
*á degi, nátt, á kvøldi síðla,*
*náði Guds er góð og sterk.*

*Einaferð í Himnasølum,*
*tá vit fara foldum frá;*
*higani úr jarðardølum,*
*verða vit har Jesus hjá.*

*Sæla løta, o , tað verður,*
*ævigt friður, gleði, gleim;*
*tá ið stóri frelsti herur,*
*øll nú eru komin heim*

(Kjartan Stakksund)

## Børnini til gudstænastu

**Kunoy:** Skíriskvøld verður serstøk barnagudstænasta hildin í kirkjuni í Kunoyar kirkju.

Eins og undanfarin ár hevur klaksvíkingurin Hanus Simonsen skipað soleiðis fyri at ein tílík gudstænasta kann verða hildin hetta kvøldið.

Við gudstænastuna í ár fer Hanus sjálvur at luttaka, eins og Jóna Thomsen av Strondum.

## Møtir og gudstænastur kring landið

Umframt hesi nevndu møtini, eru hópurin av møtum og øðrum kristiligum tiltøkum at fara til á hesi høgtíðini, sum er hin størsta hjá teimum kristnu.

Prestar og kirkjutænarar annars hava somuleiðis nógvar tænastur hesar komandi dagarnar. Prestarnir royna sovítt tað er gjørligt at koma runt til tær ymisku kirkjurnar í sóknini.

Eru teir ikki til staðar sjálvir, lesur deknurin lestur ella talari uttanífrá hevur prædikuna. Eitt dømi um hetta er gudstænastan kl. 12 langafríggjadag í Gásadali, har John S. Myllhamar úr Sandavági prædikar.